**8b, Tvøroyrar skúli**
**Tvøroyri**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 1/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(næmingaráð)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður gjørdar henda broyting:

§ 56, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Til hvønn skúla, ið hevur 5. ella eldri floksstig, hava næmingarnir skyldu til at stovna eitt næmingaráð."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2014.

**Viðmerkingar**
Av tí, at fleiri skúlar ikki skipa fyri og virða omanfyristandandi, verður mælt til eina greining og herðing soleiðis, at endamál fólkaskúlans verður fylgt og virkar í samsvarandi
- sí § 2, stk. 3, har tað í pørtum stendur at lesa, at:

> "hann (fólkaskúlin) skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur i einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

Í barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum stendur, at:

> "børn og ung hava rætt til at siga frá teirra áskoðan og skulu verða tikin fyri fult í spurningum, sum snúgva seg um tey sjálvi.

Føroyar hava bundið seg til barnarættindasáttmálan hjá ST.

Ein stórur partur av arbeiðnum hjá fólkaskúlanum er at uppala børn og ung til demokrati. Hetta verður ikki gjørt bert við at undirvísa í demokrati, men í nógv størri mun t.d. gjøgnum arbeiði í næmingaráðnum; at geva næmingunum demokratiska samábyrgd á teirra egna gerandisdag.

Tá skúlarnir hava eitt virkið næmingaráð, læra næmingarnir í praksis at samstarva, at vísa álit og virðing, at lurta eftir øðrum, at geva og taka ímóti fyri at røkka einum úrsliti, og at man til tíðir fær sitt uppskot samtykt og til aðrar tíðir ikki.

**Á Ungdómstingið 10. februar 2014**

Bárður Dimon　　Leyvoy í Gerðinum　　Britt Hovgaard

Tóki Wiberg Justinussen　　Gudmundur Mortensen　　Miriam við Reiðlið Nielsen

Tabita av Rana Nitschke　　Brandur Gaard Solmunde